Hanna D. Andreassen

Fra: Atli Suni Leo
Sendt: Monday, February 5, 2024 14:43
Til: Hanna D. Andreassen
Cc: Høgni Warberg; Poul Geert Hansen; Oystein Sørensen; Bjarni Askham Bjarnason; Fíggjarmálaráðið
Emne: Hoyringssvar frá Fíggjarmálaráðnum til uppskot til ll. um broyting í ll. um fólkaskúlan
Vedhæftede filer: Uppskot til ll. um broyting í ll. um fólkaskúlan - grein 20 næmingatalið - 190124.pdf

Til Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið hevur bert viðmerkingar til fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum.

Nevnt verður, at kostnaðurin verður 4 mió. kr. fyrsta árið (2025) og síðani 4 mió. kr. afturat árliga, inntil komið verður upp á 36 mió. kr. um 9 ár (2033).

Fíggjarmálaráðið vil vísa á, at kostnaðurin fylgir skúlaárinum, og tískil verður kostnaðurin smáar 2 mió. kr. í 2025, og veksur síðani við 4 mió. kr. árliga, inntil komið verður upp á smáar 34 mió. kr. í 2033. Í 2034 verður hækkingin góðar 2 mió. kr., soleiðis at samlaða hægri kostnaðurin verður 36 mió. kr. árliga.

Staðfest verður, at fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, sum verða 2 mió. kr. í 2025, og síðani stigvíst vaksandi við 4 mió. kr. árliga, inntil komið verður upp á 36 mió. kr. í 2034, ikki er við í kendum játtanarframskrivingum, og tískil koma at økja um rakstrarútreiðslur landsins frameftir.

Vh Atli Suni Leo
ráðgevi

Fra: Hanna D. Andreassen <hanna@bumr.fo>
Sendt: 19. januar 2024 13:54
Til: Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; Nám <nam@nam.fo>; Sernám <sernam@sernam.fo>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; nad@setur.fo; lararaf@lararafelag.fo; johannms@saf.fo; Føroya Pedagogfelag <pedagog@pedagogfelag.fo>; kf@kf.fo; Gigni <gigni@gigni.fo>; megd@megd.fo; Foreldrafelagið Heim og Skúli <heimogskuli@gmail.com>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Emne: Uppskot til ll. um broyting í ll. um fólkaskúlan til hoyringar við freist 5. februar 2024, kl. 12.00

Góðu tit

Viðheft verður sent tykkum til hoyringar «Uppskot til ll. um broyting í ll. um fólkaskúlan». Talan er um uppskot um broyting av grein 20 í fólkaskúlalógini um næmingatal í hvørjum flokki.
Høvuðsendamálið við lógarbroytingini er, at lærarin fær meira tíð til hvønn einstakan næming, og at hvør einstakur næmingur fær betri læriumstøður. Tískil skal tað við hesi lógarbroyting verða møguligt hjá hvørjum einstøkum skúla at býta upp í tveir flokkar, um næmingatalið í flokkinum við skúlaársbyrjan er hægri enn 20. Í galdandi lóggávu stendur í § 20, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Hetta broytingaruppskot inniber eina nýskipan, har einstaki skúlin fær rætt til at avgera, um floksbýtið verður gjørt við næmingi nr. 21, ella um sett verður inn við øðrum fyriskipanum, herundir t.d. við tvílæraraskipan. Henda skipan

verður galdandi frá skúlaárinum 2025/2026. Tá verður byrjað við 1. flokki, og skipanin verður síðan rullað út yvir 9 ár og soleiðis sett í gildi eftir nýggju árum við einum árligum kostnaði á umleið 4 mió. kr.

Freistin at svara og koma við viðmerkingum til hetta lógaruppskot **er mánadagin 5. februar kl. 12:00**.

Møgulig svar verða at senda umvegis teldupost: bumr@bumr.fo.

Sent til hoyringar hjá:

Undirvísingarstýrinum,

Námi,

Sernámi,

Námsvísindadeildini,

Føroya Lærarafelag,

Føroya skúlaleiðarafelag,

Føroya Pedagogfelag

Føroya Kommunufelag,

Gigni,

Megd, og

Felagnum Heim og skúli,

umframt aðalráðini

Vinarliga / Kind regards

Hanna D. Andreassen
Stjórnarskrivari / Personal Secretary

Office: +298 306500
Mobile: +298 555060
Mail: hanna@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo